# Gera okkara besta

**Henrik Larsen dugir væl at síggja, at Írland eru favorittar til dystin mikudagin, men hann staðfestir, at bæði hann og leikararnir fara at gera sítt besta, fyri at fáa eitt gott úrslit**

VENJARIN
*Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen*



**Dublin, Írland:**
Tað er einki at ivast í, at talan verður um stóra uppgávu hjá føroyska liðnum, tá farið verður inn á Landsdowne Road í írska høvuðsstaðnum. Eftir javnleikin á útivølli móti Fraklandi, tykist Írland vera í góðari støðu í undankappingini. Hetta tó treytað av, at trý stig fáast til vega mikudagin, og í írsku miðlunum verður so ikki roknað við, at hetta skal gerast nakar trupulleiki.

– Tað er jú ikki fyrstu ferð, at vit lesa tað í bløðunum, og sum so hava tey eisini rætt í tí. Írland burdi ikki havt nakrar trupulleikar av okkum, men á vøllinum eru tað ellivu móti ellivu. Og raka vit rætta dagin, samstundis sum teir ikki eru heilt klárir, so kann tað jú vera, at vit fáa gjørt okkurt óvæntað. Hyggur tú at leikarunum, so hava teir jú nakrar framúr góðar leikarar, sum spæla við stórum feløgum, so teir burdu verið betri enn vit. Men enn einaferð, so eru tað ellivu móti ellivu, sum fara á vøllin, segði føroyski landsliðsvenjarin, tá hann seinnapartin mánadagin hevði havt fyrstu venjingarnar við hópinum her í Írlandi.

Og síggjast skal heldur ikki burtur frá, at okkara menn júst hava fingið eitt gott úrslit, og sjálvur helt Henrik eisini, at lagið í hópinum var gott.

– Tað haldi eg, at tú sást á venjingini í dag. Spælararnir tykjast ógvuliga uppsettir, og teir arbeiddu knallhart. Vit høvdu eisini ein fínan dag á strondini í gjár, og hóast tað so kortini gjørdist nakað drúgt við hasi ferðini, men tíbetur sær ikki út til, at tað hevur gjørt so nógv. So mugu vit geva teimum nakað av hvíld nú, og so síggja vit, hvussu allir eru fyri í morgin.

*– Hvíldin hevur minst líka stóran týdning hjá okkum, sum venjingin hevur, staðfestir Henrik Larsen, sum ætlandi skar venjingarnar hjá føroyska liðnum niður í tvær í Írlandi*

### Hvíldin hevur týdning

Júst drúgva ferðing gav annars veruligan ótta hjá nógvum, undan dystinum her í Írlandi, men sum nevnt omanfyri, so heldur Henrik Larsen ikki, at tað hevur gjørt so nógv, sum vandi var fyri.

– Vit ótu morgunmat, beint sum vit komu fram mánamorgunin, og so fingu leikararnir loyvi at sova til 13.00. Eftir venjingina her í kvøld stendur so aftur hvíld á skránni, og so rokni eg við, at vit bara taka eina venjing í morgin. Tað hevur hóast alt verið ein drúgv ferð, so hvíldin hevur minst líka stóran týdning hjá okkum, sum venjingin hevur, staðfestir Henrik Larsen.

Tað hevur fleiri ferðir áður víst seg, at meðan føroyska landsliðið ikki hevur staðið seg væl móti suður- og eystureuropeiskum tjóðum, so hevur bretski fótbóltsstílurin í nógvar mátar hóskað sera væl til okkara.

– Vanliga hóskar hesin fótbólturin betri til okkara, men tú skalt ikki síggja burtur frá, at teir hava nakrar frálíkar leikarar. Damien Duff er til dømis ein framúr góður driblari, sum kann skapa nógv einsamallur, so tað verður altso ikki nøkur løtt uppgáva. Vit mugu so bara síggja, hvat teir fara at koma við mikudagin, og so mugu vit gera okkara besta, til tess at byrgja upp fyri hesum, segði føroyski venjarin at enda.

# John tekur tað róligt

**Hóast tað líkist einum plássi millum teir fyrstu ellivu, eftir tveir túrar á beinkinum, so tykist John Petersen taka tað púra rólig, nú venjararnir skulu seta føroyska liðið**

LEIKARAPRÁT
*Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen*

**Dublin, Írland:**
Tey flestu mundu halda, at tann av føroysku útskiftingunum, sum gjørdi besta munin á Cypern, var tá John Petersen varð settur inn á vøllin. Alt fyri eitt byrjaðu nøkur ting at hanga saman í føroyska spælinum fram eftir vøllinum, og sjálvur tykist John eisini hampuliga væl nøgdur um tað, sum hann fekk avrikað hetta korterið.

– Tað var so tað, sum eg skuldi inn til. Altso at royna at fáa fatur á nøkrum bóltum og fáa spælið at hanga betri saman. Tað gekk eisini hampuliga væl, men tað var ræðuliga tungt at koma inn í ein slíkan dyst. Pulsurin var ikki komin heilt upp, tá eg fór á vøllin, og við ferðini, sum tá var á spælinum, var tað sera strævið at fylgja við, og eftir bert fáum minuttum var eg mest sum pøstur.

### Einki er givið

Óbeinleiðis, so var tað helst tilgongdin av Claus Bech Jørgensen, sum trýsti John Petersen út á landsliðsbeinkin, har hann annars hevur verið rárur gestur. Hesaferð verður Claus tó ikki á liðnum, og tí er nærliggjandi at hugsa, at venjararnir fara aftur til uppstillingina, sum fyri tað mesta varð nýtt undan hesi tilgongdini. Altso við Rógva Jacobsen sum vinstra miðvallara og John sum øðrum av álopsleikarunum.

Sjálvur tykist John tó ikki hava kannað sær nakran bita. Og hann heldur fast um, at venjararnir hava fleiri møguleikar, nú liðið skal setast saman.

– Eg taki tað púra róligt. Teir kunnu seta Heðin beinleiðis á vinstra miðvøll, og sjálvandi er Rógvi eisini ein møguleiki har, men fyri tað er ikki víst, at eg verði leikarin, sum kemur á plássið fyri Rógva.

– So alt í alt, so vóni eg bara, at eg kann fáa eina løtu á vøllinum onkra staðni í dystinum, sigur altso John Petersen at enda.

*Hóast tað tykist sum uppløgd loysn, so vil John Petersen á ongan hátt staðfesta, at hann verður millum teir fyrstu ellivu mikudagin*






# Hundraðtals áskoðarar

**Hóast tey vóru ljódlig í Nicosia, so verður stuðulin frá føroysku áskoðarunum helst enn størri í Dublin**

ÁSKOÐARAR
*Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen*



*Longu kl. 15 fara føroysku áskoðararnir at savnast nærhendis leikvøllinum. Dysturin sjálvur verður leiktur kl. 19.30*

**Dublin, Írland:**
Tað hevur ikkis sjónligt í býarmyndini enn, at talan verður um landsdyst mikudagin, men tað er einki at ivast í, at so hvørt sum týsdagurin líður, verða alt fleiri fløgg og annað, sum hoyrir fótbóltsáskoðarum til, at síggja í býnum.

Og eins lítið er helst at ivast í, at eisini eyðkendu føroysku litirnir verða at síggja. Úr Fótbóltssambandinum hevur ljóðað, at tey hava selt eini eini 700 atgongumerki til dystin. Eina staðni millum 300 og 400 av hesum eru komin beinleiðis til Dublin við Atlantic Airways, sum nærum hevur gjørt eina luftbrúgv úr Vágum til írska høvuðsstaðin seinastu dagarnar, og so verður roknað við, at hópur av áskoðarum fara at gera sær dælt av samstarvinum, sum føroyska flogfelagið nú hevur gjørt við Maersk Air. Tað merkir nevnliga, at eftir eina flogferð til Kastrup, er tað mest sum kostnaðarleyst at koma víðari til Dublin.

### Úr at gera

Og sum skilst, so hava føroysku áskoðararnir fingið fleiri upplivingar á ferðini. Mánadagin hevði hópur av teimum verið á rundferð á Guinnes bryggjarínum, sum liggur skamt frá hotellinum, har ferðalagið hjá 12. manni heldur til, og seinni um kvøldið fór stórur hópur av hesum til væl kenda Mama-Mia musicalin.

Týskvøldið stóð írskt kvøld á skránni, og skuldi hetta ganga fyri seg í útjaðaranum av Dublin. Her skuldu áskoðararnir vitja eina pub, har matarlepin er samansettur av bestu írsku rættunum, og eftir hetta skuldi írskur tónleikur og fólkadansur sjálvsagt á skránna.

Mikudagin er so dystardagur, og her verða fyrireikingarnar eisini nógvar. Longu kl. 15. verður byrjað at savna fólk saman á eini pub nærhendis leikvøllinum, og so er einki at ivast í, at føroyska ferðalagið her fer at royna at doyva alla ljóðliga mótstøðu frá írsku fjøldini.

# Gott at vera við

**Hóast hann mest sannlíkt als ikki kemur á dómaraseðilin, so sigur Bárður Johannesen seg hava eina fína ferð við landsliðnum**

TRIÐI MÁLVERJIN
*Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen*



*Hóast talan »bert« hevur verið um venjingar, so vónar Bárður Johannesen, at hann fer at fleiri ferðir av hesum slagnum framyvir*

**Dublin, Írland:**
Sum gardering fyri Jákup Mikkelsen, nú hesin fyri stuttum hevur verið skaddur, gjørdu landsliðsvenjararnir av, at taka ein triðja málverja við í hópin hesaferð.

Valið fall á Bárð Johannesen úr HB, og hóast hann ikki hevur nøkur serlig útlit fyri spælitíð á ferðini, nú bæði Jákup og Jens Martin eru tøkir, so dylir hann ikki fyri, at talan hevur verið um stóra uppliving.

– Tað hevur tað avgjørt verið. Hetta er fyrsta ferðin, at eg eri við til undankappingardyst, so fyri meg er talan avgjørt um framstig.

Bárður var annars eisini við í landsliðsmyndini í vár, tá venjingarlegan var á skránni, men ein skaði stutt eftir hetta bar við sær, at tað ikki var fyrr enn um ólavsøkumundið, at hann aftur kundi spæla.

Ta ferðina duldi hann ikki fyri, at skaðin kom ógvuliga illa við, nú hann var um at koma í landsliðshitan, og tí er gleðin eisini tilsvarandi størri, nú hann aftur er við eftir bert hálvt kappingarár á vøllinum.

– Eg haldi sjálvur, at tað hevur gingið støðugt framá hjá mær, síðani eg kom aftur, og hetta er heilt víst eitt deiligt punktum fyri kappingarárinum. So má eg bara taka eitt ordiligt ár næsta ár, soleiðis at mann kann koma enn nærri liðnum.

*Og kappingarneytarnir hjá tær eru kanska um at verða nakað gamlir og slitnir?*

– Ja, eg eri í øllum førum nógv tann yngsti í so máta, so nú má vera tíð at lata øðrum framat, staðfestir Bárður flennandi.

# Keane kortini við

Tað ljóðaði mánadagin, at ein av stóru stjørnunum á liðnum hjá Írlandi, Roy Keane, ikki fór at verða tøkur hjá írum til føroyadystin. Fyrst og fremst varð sagt, at Manchester United miðvallarin hevði fingið ein lítlan snudd í knæið, men hartil roknaðu írsku miðlarnir við, at liðið ikki fór at taka nøkur óráð fyri móti lítlu Føroyum.

Keane hevur nevnliga longu eitt gult kort á kontini, og gult kort í næsta dystinum ber við sær, at hann er leikbannaður til komandi undankappingardystin, sum verður í Tel-Aviv móti Írsael.

Týsdagin tóktust boðini tó at vera broytt nakað. Roy Keane hevði framvegis ikki vant við restini av liðnum, men hann hevði runnið við fullari ferð, uttan at merkja nakað sum helst til skaðan. Og hóast Írland eru stórfavorittar undan dystinum, so er helst einki at ivast í, at venjarin fer at senda tað liðið, sum hann heldur vera sterkast, á vøllin.

**-jm**

# Broytt írskt álop

Tá Írland leikti javnleik á útivølli móti Fraklandi, mátti fremsti álopsleikarin, Clinton Morrison, fara skaddur av vøllinum.

Niðurstøðan hjá læknunum er, at Morrison helst ikki er førur fyri at spæla næsta mánaðin, og hann verður tí heilt víst ikki við í hópinum móti Føroyum.

Ístaðin rokna írsku miðlarnir við, at Damien Duff verður fluttur upp í álopið undir liðini á Robbie Keane, og at Andy Reid úr Nottingham Forrest kemur inn á vinstra miðvøll.

**-jm**

# Varnir írar

Hóast teir hava fingið tvey góð úrslit við javnleikum á útivølli móti ávíkavist Sveis og Fraklandi, so tykjast írsku leikararin ikki taka nakað fyri givið, nú Føroyar koma á vitjan.

Talan er annars um ein dyst, sum írsku miðlarnir krevja skal vinnast trygt, og einki er at ivast í, at talan verður um eina sensatión, um okkara menn fáa nakað við sær úr dystinum.

Hetta er tó ikki nakað, sum tykist taka leikararnar av fótum. Týsmorgunin hevði SkyNews orðið á Kenny Cunningham, og hann ávaraði ímóti, at írar tóku sær av løttum hesaferð.

– Sjálvandi eru vit favorittar, og vit eiga eisini at vinna. Men fyri tað fer sigurin ikki at koma av sær sjálvum. Vit vita, at óvæntað úrslit kunnu koma fyri í fótbólti, og eru vit ikki 100% klárir til dystin, so kunnu vit gerast offur fyri einum slíkum.

– Eg sigi ikki, at vit skulu vera bangnir, men vit skulu vita, at møguleikin fyri einum óvæntaðum úrsliti er til staðar, og tí mugu og skulu vit taka uppgávuna í størsta álvara, segði altso Kenny Cunningham at enda.

**-jm**